# Børn eru tilvit



*- Ofta hava vit lyndi til at siga, at børn bara vilja hava. Men so er ikki, heldur Erika Hayfield, nýklaktur Ph.D. og ráðgevi á Sansum.*

**Fríggjadagin vardi Erika Hayfield sína Ph.D.-ritgerð um børn og brúkaramentan, har hon m.a. staðfestir, at børn eru meira tilvitað um nýtslu enn higartil hildið. Í fimm ár hevur hon verið millum børn og sett seg inn í teirra viðurskifti og nýtslumentan**

GRANSKING
*Theodor E. D. Olsen*
*theodor@sosialurin.fo*

Seinastu árini hevur Erika Hayfield skrivað Ph.D.-ritgerð um børn og brúkaramentan hjá børnum. Fríggjadagin vardi hon ritgerðina á Natier University í Edinburgh, og niðurstøðan hjá henni er í stuttum, at børn eru nógv meira tilvitaðir og margfaldir brúkarar enn higartil hildið.

Ætlanin við eini slíkari ritgerð er í høvuðsheitum at geva okkurt nýtt til vísindina, og í hesum sambandi er sjálvur hátturin ella tann sonevnda metodan, ið Erika Hayfield nýtti í sínum granskingararbeiði, rættiliga serstøk.

Erika Hayfield sigur við Sosialin, at í øðrum kanningum hevur tað, ein kann kalla »maktbýtið« millum granskara og børn, ofta verið ójavnt, og tí setti hon sær fyri at bróta hesa forðing. Hon hevur tí ikki hugt so nógv eftir tølum ella at gjørt kanningina kvantitativa. Tvs. at hon valdi ikki at býta út spurnarbløð o.t. til børnini uttan at hava annað samband við tey. Hetta varpar nevniliga eitt annað ljós á viðurskiftini, spurningarnir verða settir øðrvísi, og tí verða svarini eisini nøkur onnur.

- Eg valdi tí heldur at fara í dýpdina, sigur Erika Hayfield, sum var eitt heilt ár millum tilsamans eini 100 børn í Skotlandi, har hon gjørdi kvalitativar kanningar. Umframt hetta hevur hon virkað í 5 ár millum børn í sambandi við sína gransking.